# Føroyingar og írar spæla saman

**Í døgunum beint áðrenn Føroyar spæla fótbóltslandsdyst móti Írlandi á Tórsvølli mikukvøldið 8. juni, spæla Føroyar saman við Írlandi í Býráðshøllini í Runavík 6. juni og í Norðurlandahúsinum 7. juni**

**Tónleikur**
*Tíðindaskriv*



*Føroyskir tónleikarar úr Yggdrasil fara í døgunum undan landsdystinum at spæla saman við írskum tónleikarum*

Her verður tó ikki talan um at spæla fótbólt móti hvørjum øðrum, men um at spæla tónleik saman. Føroyskir tónleikarir úr bólkinum Yggdrasil fara nevniliga at spæla saman við írskum tónleikarum.

Teir írsku tónleikarirnir, talan er um, eru Máire Breathnach, ið spælir violin, og Thomas Loefke, ið spælir á harpu. Thomas Loefke hevur vitjað í Føroyum sum tónleikari á hvørjum ári seinastu 7 árini, og Máire Breathnach vitjaði í Føroyum síðsta ár, har hon spældi saman við Thomas Loefke á Fólkatónleikastevnuni og á G!Festivalinum. Manningin í Yggdrasil er Kári Sverrison, vokal, Heðin Ziska Davidsen, guitar, Kristian Blak, klaver, Mikael Blak, bass, og Brandur Jacobsen, trummur. Harafturat spælir Villu Veski úr Estlandi saxofon.

Umframt hesar báðar konsertirnar í Føroyum, fer Yggdrasil í juni mánaði á konsertferð til Íslands, har bólkurin skal spæla í Norðurlandahúsinum í Reykjavík tann 8. juni, og á Rochester International Jazz Festival í New York 10. og 11. juni. Yggdrasil hevur annars ferðast víða um á konsertferðum síðani 2003. Bólkurin hevur millum annað verið á konsertferð í USA, Hawaii, Hollandi, Týsklandi, Finnlandi, Estlandi, umframt fleiri Norðanlondum. Á hesum konsertferðunum hava antin Eivør Pálsdóttir ella Kári Sverrisson verið við sum sangarar.

Tað er Tutl, ið stendur aftan fyri konsertirnar, og fyrireikarirnir vóna, at tað umframt føroyingar eisini koma írar til konsertina. Konsertin í Býráðshøllini í Runavík verður mánadagin 6. juni kl. 20.00, og konsertin í Norðurlandahúsinum verður týsdagin 7. juni kl. 19.30.

# FHS sum fjarlestur heldur fram

**Seinasta árið hava næmingar kring alt landið tikið lut í FHS fjarlestrinum, sum Føroya Handilsskúli á Kambsdali bjóðar út. Fram til 3. juni er møguleiki hjá nýggjum næmingum at søkja um upptøku**

**FJARLESTUR**
*Tíðindaskriv*

Tey, sum áður hava verið forðað at taka eina miðnámsútbúgving ella partar av einari, hava fingið ein nýggjan møguleika. Komandi skúlaár fer Føroya Handilsskúlin á Kambsdali nevniliga at bjóða fleiri FHS stakgreinir sum fjarlestur. Byrjað varð við hesum útbúgvingartilboði fyri einum ári síðani, og higartil hevur gingið væl, og fyrstu næmingarnir fara til próvtøku í juni mánaði. Tað eru Amerada Hess, BP Amoco og Innlendismálaráðið, ið hava veitt fíggjarligan stuðul til verkætlanina, og hesin stuðul ger tað møguligt at halda fram eftir summarsteðgin.

## Miðnámsskúli til øll

Við verkætlanini hava øll ein veruligan møguleika at taka eina føroyska miðnámsútbúgving. Ætlanin er at røkka einum málbólki í føroyska samfelagnum, sum í dag ikki hevur góðar møguleikar at koma á miðnámsskúla. Hetta eru t.d. fólk á útoyggj ella fólk, sum, vegna arbeiðsstøður ella sosialar og fysiskar umstøður, ikki hava møguleika at fara á mið-námsskúla. Eisini er hetta ein góður møguleiki hjá han-dils- og skrivstovu-lærlingum, sum ikki hava FHS frammanundan, at taka kravdu lærugreinirnar. Hetta kunnu t.d. vera lærlingar við øðrum miðnámsútbúgvingum ella 10. flokki.

## FHS vælegnað

FHS er ein 1 ára miðnámsútbúgving, sum er grundarlagið undir eini 2 ára handilsgymnasialari útbúgving (HH). FHS útbúgvingin er somuleiðis ástøðiligur partur av handils- ella skrivstovulæru. T.v.s. at eftir eitt lokið FHS prógv kanst tú fara í læru, fara víðari á HH ella steðga á og framvegis hava eina førleikagevandi útbúgving. FHS hevur somuleiðis lærugreinir, sum eru viðkomandi fyri nógvar ymiskar málbólkar í samfelagnum. T.d. Virkisbúskap, ið fyrst og fremst snýr seg um bókhald og roknskap, Marknaðarførslu, sum er um sølu og tænastu og Kunningartøkni. Harafturat eru meiri almennar lærugreinir sum Týskt, Føroyskt, Støddfrøði, Samfelagslæra. Fjarlesturin verður fyriskipaður sum stakgreinalestur. T.v.s., at næmingar skulu til próvtøku í øllum lærugreinum. Hetta gevur møguleikar fyri at tillaga samlaða útbúgvingarskeiðið og valið av lærugreinum hjá hvørjum einstøkum eftir tørvi.

## Nýggjar leiðir

Fjarlestur er í stórari menning og útbúgvingartilboðini floyma yvir okkum. Skúlin metir tað hava týdning, at eisini hesin útbúgvingarmøguleiki verður mentur í Føroyum, so føroyingar eru førir fyri at veita føroyingum útbúgving við fjarlestri. Treytin fyri upptøku er nøktandi 9./10. floksprógv. Tað er ein fyrimunur at hava viðkomandi starvsroyndir og kunnleika til teld. Umsóknarbløð og nærri kunning fáast við at venda sær til Føroya Handilsskúla á Kambsdali á 444 900 ella fh@kambsdal.olivant.fo, og á heimasíðu skúlans, sum er www.fh.fo. Umsóknarfreistin er 3. juni 2005.


# Sølufólk til nýggjan handil

**Maria Poulsen**
*letur upp nýggjan handil*

Handilin fer at hava Føroya størstu framsýning av baðirúmsmøblum og øllum, sum har til hoyrir. Dentur verður lagdur á, at baðirúmið ikki longur bara er eitt funktionelt rúm, men heldur eitt rúm, har dygd og lívsgleði koma til sjóndar. Handilin fer at gerast leiðandi innan baðirúmsinnbúgv í Føroyum.

**Tað setur krøv til starvsfólkið**
Tú kemur, í samstarvi við onnur, at taka tær av einum spennandi og fjøltáttaðum handli. Tú fær møguleika til at hjálpa og leiðbeina kundum okkara og at keypa vørur heim. Samstundis fært tú ábyrgd og ávirkan at menna handilin. Starvið kann røkjast av kvinnu ella manni.

**Tað er ein fyrimunur um umsøkjarin hevur:**
- Royndir innan handil
- Royndir innan køkar, HVS, innbúgvi ella líknandi
- Fyrikomandi, nærlagdur, íðin, sjálvstøðugur og kreativur
- Skilur týdningin av góðum handverki, góðsku og góðari kundarøkt
- Ella annað ið tú heldur er ein fyrimunur

**Afturfyri bjóða vit:**
- At tú verður lærd/ur upp í okkara vøruúrvalið
- At tú fært eitt spennandi starv við nógvum møguleikum
- At tú fært góðar samstarvsfelagar í góðum fakligum arbeiðsumhvørvi
- Ávirkan á tín egna arbeiðsdag.
- Eina løn í samsvarar við tín førleika
- Stutt sagt eitt spennandi starv í einari fyritøku, í støðugari menning

Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skal verða innkomin seinast 3. juni til:

**P/F Maria Poulsen**
Smyrilsvegur 7
Postboks 182
FO-110 Tórshavn

Nærri fæst at vita um starvið, við at ringja tel. 312 000 og tosa við Kristian á Dul, stjóra, kd@mariapoulsen.fo

**pf Maria Poulsen & Co.**








